


www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 07 - 2013

# Skera nú stálið til nýggj Thor-skip

Kl. 11:00 í morgun lokala tíð byrjaði stálskeringin til nýbygningar nr. 33 og 34, sum eru teir fyrstu í røðini av 4 skipum, sum P/F THOR letur byggja á Besiktas skipasmiðjuni í Turkalandi. Alt gongur eftir ætlan, og tað fyrsta skipið verður liðugt í august 2014 og tað næsta í november 2014. Skip nummar trý og fýra verða liðug ávíkavist í februar og mai 2015 sigur Thor í tiðindaskrivi. Tað var í fjør, at P/F THOR gjørdi avtalu um bygging av nýggjum "seismik support" skipum, sum koma at arbeiða í samband við oljuleiting. Avtalan byggir serliga á langtíðarsáttmála við seismikkfelagið PGS. ? ? Skipini eru teknaði av Skipteknisk í Ålesund í tøttum samstarvi við THOR, og fíggingin er fingin til vega í samstarvi við RS Platou Finans í Oslo . Tey eru serútgjørd til tænastur hjá seismikskipum og verða útgjørd við allari nútíðar útgerð. Eisini verða skipini bygd til at kunna fremja allar veitingar á øllum heimshøvum. Skipini verða 64 metur til longdar og 14,5 metur til breiddar. Avtala er gjørd um íalt 8 skip (4+4) og er soleiðis, at í fyrstu atløgu eru fýra skip sett í gerð, har tað fyrsta verður leverað í august 2014 og tey næstu trý við trimum mánaða millumbilum. Felagið hevur síðan optión uppá fýra skip afturat til levering í 2015 og 2016. Skipini verða bygd á skipasmiðjuni Besiktas í Turkalandi. ? ?Hetta er nógv tann største avtalan hjá felagnum THOR higartil. Myndir Stjórarnir hjá Thor, Gunnbjørn Joensen og Hans Andrias Joensen Umboð fyri Besiktas skipasmiðjuna og Thor Frá Thor: Alfred Joensen, HSE&Q manager, Gunnbjørn Joensen, Managing director, Poul Nolsøe Laksáfoss, project manager, Yavuz Surucu, Site manager and Hans Andrias Joensen C.E.O